## DAGSINS MEINING

### Summar á skíggjanum

Seinnapartin í dag byrjar HM-endaspælið í fótbólti. Hóast Føroyar – kanska sjálvsagt – ikki eru partur av fína selskapinum, sum spælir í Týsklandi, so er einki at ivast í, at stórur partur av landinum fer at sita við skíggjan, hóast fagrasta summarveður til tíðir kann vera uttanfyri. Ella kanska verður sjónvarpið bara drigið út í tún onkran dagin.

Tí hvussu víkir og vendir, so hevur fótbólturin seinnu árini ment seg til at verða størsti undirhaldsídnaðurin í heiminum. At kalla øll hava eina meining um, hvørt talan var um brotsspark ella. Hvør spælari skaraði framúr í einum dysti, ella hvussu tann og tann dómarin dømdi.

Hetta eru alt lutir, sum kunnu fáa sinnini í kók til tíðir, men júst tí er týdningarmikið at minnast til, at fótbóltur í veruleikanum er undirhald. Talan er um eitt spæl, sum allur heimurin er follin fyri, og tí er sjálvandi altavgerandi, at spælið sjálvt verður hildið í hásæti.

Tað kunnu vit í Føroyum kanska ikki gera so nógv við, tá fremstu fótbóltstjóðirnar dystast í Týsklandi. Men hetta er tó nakað, sum vit øll eiga at leggja okkum geyma. Ikki minst, nú heimliga kappingin tykist hava fingið hópin av negativari umtalu fyrstu umførini umførini í ár. Negativa umtalan hevur sjálvandi sínar orsøkir, men vit øll – spælarar, dómarar, leiðarar og áskoðarar – eiga øll at geva okkara íkast til, at hetta ikki fær gróðrarfesti. Og tað gerst bert við at vísa góðar tankar og føgur orð í verki.

Gott fótbóltssummar!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Um talgilda heilsuskipan til føroyska heilsuverkið



**HANS PAULI STRØM**
landsstýrismaður

### Viðmerkingar til Danjal Petur Højgaard, kommunulækna

Danjal Petur Højgaard (DPH) hevur í bløðunum nú um dagarnar áhugaverda grein undir yvirskriftini “Kommunulæknar í Føroyum eftirbátar”, har hann m.a. kemur inn á arbeiðið hjá Almanna- og heilsumálaráðnum viðvíkjandi EPJ (tað sum vit kalla Talgilda heilsuskipan, stytt THS).

Vit í Almanna- og heilsumálaráðnum kenna til menningararbeiðið og tær visjónir, DPH hevur viðvíkjandi talgilding av føroyska heilsuverkinum, og meta vit hesar verða rættuliga framskygdar og fult í tráð við tað skipan, sum AHR er í ferð við seta í verk.

DPH metur, at byrjanin av verkætlanini varð skeiv við tað, at hetta varð fráboðað sum ein skipan fyri sjúkrahúsverkið, men at kommunulæknarnir vóru vælkomnir við um teir ynsktu tað. Tað kann vera, at útmeldingin ikki hevur verið nóg beinrakin. Men grundin til hetta er, at AHR ikki metti seg kunna seta sum krav at kommunulæknarnir eru við, av tí at tað eru kommunurnar sum gjalda KT-íløgurnar og raksturin fyri kommunulæknarnar. Hinvegin mettu vit og meta vit, at hetta er ein skipan, sum hevur so stórar fyrimunir, serliga fyri borgararnar, men eisini fyri kommunulæknarnar, og at hetta verður eitt “must” í heilsuverkinum. Til dømis eru 60-70% av øllum blóðroyndum og røntgenkanningum bílagdar av kommunulæknum

Vit hava frá byrjan av havt kommunulæknarnar við í verkætlanini, bæði í stýrisbólki og í projektbólkum, og umboð fyri báðar kommunufelagsskapirnar hava eisini verið við í stýrisbólkinum.

Tann kritikkur kommunulæknarnir í Tórshavn føra fram, er at hetta ikki er ein skræddaraseymað skipan til kommunulæknarnar, at faktureringsfunkan ikki er nóg smidlig, og at skipanin arbeiðir ov seint. Vit vilja føra fram, at skipanin ikki er skræddaraseymað til ávísar starvsbólkar, men til føroyska sjúklingin. Viðvíkjandi faktureringsloysnini eru vit samd við kommunulæknarnar um, at hendan er ov stirvin. Tí hava vit tikið stig til at fáa broytt hesa loysn soleiðis at hon er í tráð við ynskini hjá kommunulæknunum. Trupulleikin við skjótleikanum er longu loystur.

DPH vísir á, at trygdin í skipanini eisini er ábyrgdin hjá kommunulæknunum. Her kunnu vit ikki vera annað enn samd, at tað serliga er upp til brúkaran av skipanini (kommunulæknar, sjúkrahúslæknar og onnur heilsustarvsfólk) at vísa neyðug fyrilit fyri trygdini hjá borgaranum, bæði tá tað ræður um at tryggja trúnaðin og tá tað ræður um at fáa atgongd til dáta. Tað er m.a. hetta, ið liggur í hugtakinum “informeret samtykke”, sum er gjøgnumgangandi hugtak í lóggávuni á økinum, “Lov om patienters retstilling”. “Informeret samtykke” í hesum sambandi merkir í stuttum ein skylda hjá heilsustarvsfólki at kunna sjúklingin og innheinta samtykki um sjúklingadata skulu latast víðari til onnur heilsustarvsfólk.

DPH eftirlýsir einum meiri virknum kommunulækna leikluti í Talgildu verkætlanini, og tí kunnu vit ikki annað enn taka undir við, og skipa vit fegin fyri einum innleiðandi fundi hesum viðvíkjandi. Tað er enn ikki ov seint at fáa tillaga skipanina soleiðis, at hon gerst eitt enn betri amboð, eisini hjá kommunulæknunum. Harafturat er ein tílíkur fundur eitt gott høvi hjá kommunulæknunum at gera vart við seg og hjá okkum at rudda møguligar misskiljingar av vegnum, m. a. um trygdarviðurskifti í skipanini.

# Nú verður spakin settur í til rennibreyt í Havn

**Tórshavnar býráð hevur tikið av einum tilboði um at grava oman av økinum á Hálsi í Havn, ið skal gerast til rennibreyt, og fyrsti spakin verður settur í fyri summarfrítíðina**

**RENNIBREYT**
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Arbeiðið at gera rennibreytina á Hálsi í Havn, ið skal hava seks geirar og ein fótbóltsvøll inni í miðjuni, verður nú av álvara sett í gongd.



*Modell av rennibreytini, sum verður gjørd í Havn*

*Mynd: Munin*

Talan er um eitt arbeiði, ið skal gerast í trimum stigum, og farið verður longu fyri summarfrítíðina í holt við fyrsta stigið, sum er at grava oman av økinum.

- Tá grivið er omanav, sæst betur, hvussu nógv grót skal beinast burtur í øðrum stigi og hvat annars er at gera á økinum, áðrenn farast kann víðari til triðja stig, sum er at planera alt økið, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Tórshavnar kommuna hevur fingið tvey tilboð upp á arbeiðið at grava oman av, og tikið er av tilboði frá Maskingraving við Karl Patursson, ið kann gera tað arbeiðið fyri smáar 1,2 milliónir krónur.

Málið varð samtykt uttan atkvøðugreiðslu.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo

e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.